## DAGSINS MEINING

# Gott íkast til oljuleiting

Tað vóru kærkomin og hugalig tíðindi vit fingu frá Jarðfeingi nú um dagarnar. Eitt av heimsins størstu oljufeløgum, tað italska ENI verður verandi í Føroyum. Eftir at felagið boraði turran brunn nøkur ár herfyri hevur tað ligið í kortunum, at ENI helst fór at taka seg úr Føroyum. Tað hevði verið eitt bakkast fyri oljuleitingina. Men so skuldi ikki verða.

Umframt sítt seks ára loyvi hevur ENI eisini umsitið eitt níggju ára loyvi. Og har eru treytirnar,at loyvishavari eftir seks árum sigur frá, um hann ætlar sær at bora. Og hetta er júst tað, sum ENI saman við partnaranum Føroya Kolvetni, hevur gjørt av – at bora ein leitibrunn í níggju ára loyvinum innan trý ár.

Henda avgerð, sum er fingin í lag í samráðingum við okkara egnu oljumyndugleikar, Jarðfeingi, er einki minni enn eitt ”scoop” fyri oljuleitingina sum heild. Tí við henni fáa vit nógv. Vit tryggja, at hesin oljurisin verður verandi í Føroyum við síni ekspertisu, skrivstovu og sínum fólkum. Vit tryggja, at vit fáa ein leitibrunn aftrat á landgrunninum og kanska ikki minst, hvat mong helst ikki geva sær fær um enn, so kann hesin brunnurin draga onnur oljufeløg inn í Føroyaøkið.

Tað er nevniliga væl hugsandi, at ENI sum fyristøðufelag og við heilum 75% av skyldunum í hesum loyvi, ynskir at fáa onnur feløg við at fordeila váðan. Tá nú ENI hevur gjørt av at vera verandi í Føroyum og bora ein dýran og váðiligan brunn í einum øki, sum ikki liggur so langt vekk frá ”Gullhorninum”, har leitingin ikki gav so góð úrslit, má tað væl vera tí, at serfrøðingarnir hjá felagnum meta, at her er nakað at fara eftir. Tað er so eisini ein sannroynd, at Anne Marie brunnurin, sum hesin komandi brunnur verður kallaður, liggur ikki so langt frá fleiri sera áhugaverdum oljufundum í bretskum øki, Rosebank, Cambo og Suilven. Hugsandi er tí, at fleiri oljufeløg, sum hava verið her áður, og sum neyvt fylgja gongdini á nýggju oljuleiðunum við markið, eisini fara at hava eitt gott eygað til komandi brunnin hjá ENI og tískil vilja blíva partur av honum. Hendir tað, so merkir avgerðin hjá ENI í veruleikanum, at vit kunnu fáa uppaftur fleiri oljufeløg inn á landgrunnin. Tí er avgerðin hjá ENI og Føroya Kolvetni so týdningarmikil fyri leitingina á Føroyaøkinum sum heild.

Og hvørji feløg kundi so talan verið um! Her kunnu sum dømi nevnast, ExxonMobile, Maersk Oil og Total. Ikki minst hetta seinasta felagið, Total er áhugavert, tí tað telur í veruleikanum trý oljufeløg, sum vórðu løgd saman í eitt. Og øll hesi feløgini, Total, Fina og ELF vórðu virkin á Føroyaøkinum í síni tíð. Samanleggingin gjørdi so, at tey ”mistu” áhugan ella gjørdu aðrar raðfestingar. Tey sita í hvussu er inni við nógvari vitan og royndum frá landgrunninum, og tí vildi tað verið ein ”funnin fressur”, og upplagt, um tey samanløgd aftur vendu áhuganum henda vegin. Tað hevði so styrkt um leitingina samanlagt. Og í hesum sambandi er eisini vert at hava í huganum tey loyvini, sum vórðu lutað út í 2. útbjoðing. Hesi liggja uppat brunnum, ið skulu borast komandi árini og fáa vit eitt positivt úrslit, er ikki óhugsandi, at áhugin hjá øðrum feløgum, ið ikki eru við í dag, at keypa seg inn í hesi loyvini, fer at økjast. Eitt nú situr Statoil við tveimum loyvum einsamalt. Og Geysir og Atlantic Petroleum sita somuleiðis við tveimum loyvum, har dyrnar helst standar opnar fyri nýggjum partnarum. Samanumtikið talar nógv fyri eini sera positivari gongd í oljuleitingini við Føroyar.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Álop á fjølmiðlafólk - taktikkur ella ótolni?

**JOHN JOHANNESSEN**
Løgtingslimur fyri Javnaðarflokkin



**Tað er ein gamal politiskur taktikkur at ræða fjølmiðlarnar til at bera fram eina ávísa hugsjón. Nógv bendir á, at Tjóðveldisflokkurin hevur gjørt hendan taktikkin til sín egna. Tí seinastu dagarnir hava formaður flokssins og fleiri onnur framstandandi tjóðveldisfólk brúkt nógva orku uppá hørð álop móti føroysku fjølmiðlunum**

Løgtingslóg nummar 58 um fjølmiðlaábyrgd varð endaliga samtykt við 3. viðgerð í løgtinginum 4. mai í ár. Meirilutin fyri lógini var rættiliga stórur. 30 atkvøður vóru fyri og 1 ímóti. Allur Tjóðveldisflokkurin atkvøddi fyri lógini, hóast flokkurin ikki var við til at yvirtaka málsøkið.

Fjølmiðlaábyrgdarlógin er í høvuðsheitum ein verja hjá teimum, ið verða viðgjørd í fjølmiðlunum. Lógin gevur møguleika at kæra til eina fjølmiðlanevnd, um tú heldur teg vera órættvíst viðfarnan av einum fjølmiðli.

Lógin um fjølmiðlaábyrgd fekk eina drúgva og rættiliga nágreiniliga viðgerð í rættarnevndini. Hevði sjálvur í nevndarviðgerðini eitt ógvuliga gott og jaligt samstarv við Tjóðveldisflokkin umboðaðan av Finni Helmsdal. Endin var, at ein samd nevnd mælti løgtinginum til at samtykkja lógina hjá Jacob Vestergaard, sum kemur í gildi 1. juli í ár.

### Ótolni ella yvirskipað ætlan?

Men tað tykist sum, at ávísir lyklapersónar floksins ikki hava stundir at bíða eftir kærumyndugleikanum. Ella velja teir við vilja at grava gamla kenda taktikkin fram at ræða fjølmiðlarnar og vóna at hetta fær teir at ganga eftir ávísum politiskum leisti. Í øllum førum hevur ikki skortað við hørðum álopum móti fjølmiðlum og fjølmiðlafólki seinastu dagarnar. Kringvarpið, Dimmalætting og Sosialurin hava øll staðið fyri álopi.

Hergeir Nielsen hevur í tveimum lesarabrøvum hildið uppá, at útvarpstíðindini verða stýrd úr Tinganesi. Sambært lesarabrævinum er Hergeir Nielsen eftir øllum at døma ónøgdur við, at útvarpið ger ov lítið við at bera fram hugsanirnar hjá Tjóðveldisflokkinum á uttanríkispolitiska økinum. Men haldi, at Hergeir Nielsen átti at prógva sítt uppáhald. Tí verður útvarpið veruliga stýrt úr Tinganesi, so er talan um eitt álvarsmál. Um hugsanir Tjóðveldisfloksins koma ov lítið fram í fjølmiðlunum, tað kunnu onnur meta um.

Tórbjørn Jacobsen valdi í lesarabrævi herfyri at fara uppaftur longri. Hann valdi sær nakrar ávísar persónar í skotlinjuna. Her nøkur kut úr lesarabrævi hansara:

*"...hin lítið á leið komna, ólærda og smádumma mikrofonhaldaran Sigmar út í býin, at runnið ørindir fyri hitt føroyska socialdemokratíið."*

*"At Ingi Samuelsen ikki er komin longur enn at vera apologetur hjá Sambandinum og teirra samhugaðu, tað kemur ikki óvart á nakran."*

Formaður Tjóðveldisflokssins hevur heldur ikki hildið seg aftur. Hjá honum eru tað Sosialurin og Portalurin, ið eru trupulleikin. Høgni Hoydal skrivar millum annað soleiðis:

*"Sjálvt ikki í londunum handan jarntjaldið undir kalda krígnum ella í beinleiðis einarræðislondum finnast dømir um ein so partapolitiskan og litaðan journalistikk, sum í Sosialinum og á Portalinum."*

*"Eftir mínum tykki hevur onki ítróttarlið í USA betri juhufólk á vøllinum, enn sitandi landsstýri hevur í Sosialinum og á Portalinum."*

Tykist mær eitt sindur løgi, at framstandandi tinglimir Tjóðveldisfloksins við formanninum á odda brádliga eru farnir slíka herferð ímóti føroysku fjølmiðlunum beint eftir, at teir sjálvir hava verið við til at samtykkja eina lóg, ið heimilar teimum og øllum øðrum fullan rætt at kæra um viðurskifti, sum teir eru ónøgdir við í fjølmiðlunum.

Vónandi er orsøkin ótolni ella bara vanligar frustrasjónir um at sita í andstøðu. Verri er, um hetta er ein miðvís ætlan at ræða fjølmiðlarnar til at gerast egnu boðberar teirra.

### Lifran og hóttan eru gomul vápn

Tað finnast tvey gomul vápn, ið verða nógv nýtt av ymsum áhugabólkum til at royna at vinna sær framíhjárættindi í fjølmiðlunum. Annað er at lifra fyri ávísum journalistum ella øllum miðlastovninum. Hitt er at hótta ávísar journalistar ella allan stovnin.

Danski forsætisráðharrin, Anders Fogh Rasmussen, royndi tað fyrra av hesum vápnunum herfyri. Hann valdi sær ein ávísan bólk av journalistum, ið hann helt vera vinarligar ímóti stjórnini, og bjóðaði teimum til fínan døgurða og veitslu í embætisbústaðnum, Marienborg. Tíbetur vóru journalistarnir so mikið at sær komnir, at teir í staðin fyri at møta til døgurðan skrivaðu um, hvussu forsætisráðharrin royndi at keypa teir. Ætlanin hjá Anders Fogh Rasmussen miseydnaðist, døgurðin varð av ongum, og í staðin kom ein keðilig søga fram um tiltakið í fjølmiðlunum.

Tað hóttandi vápnið er helst tað, ið verður mest nýtt í Føroyum. Av tí, at viðurskiftini her eru so tøtt, er tað lættari at brúka hetta vápnið í Føroyum enn aðrastaðni. Um túført fleiri at hótta og rópa saman við tær, verður trýstið skjótt so stórt á tann einstaka, at hann bognar fyri trýstinum, gevur tær rætt í øllum og letur vera við at viðgera teg kritiskt. Hetta kann tykjast vera yvirskipaða ætlanin hjá Tjóðveldisflokkinum. Tó havi eg tað álit á fjølmiðlafólkunum, at tey ikki lata seg ávirka av slíkum trýsti.

Men man kundi tó freistast og spurt, hví ongin enn hevur viðgjørt opinlýstu andsøgnina millum orð og gerðir hjá til dømis framsøgukvinnu Tjóðveldisfloksins í fiskivinnumálum....

## Skeiv yvirskrivt

Sum tann gløggi lesarin hevur varnast, so var skeiv yvirskrift til greinina hjá Høgna Hoydal í blaðnum í gjár.

Rætta yvirskrivtin skuldi vera **»Hvør hevur ábyrgdina av partapolitiska Sosialinum og Portalinum«** og var greinin ein almennur fyrispurningur til stjóra og nevnd hjá Føroya Tele.

Vit biðja lesarar og greinskrivara halda okkum til góðar.

**blaðstj.**


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:**
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$


**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.